Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)

TAKS hevur ongar viðmerkingar til uppskotið sum so.

Vit skulu bert viðmerkja, at vit skilja skiftisregluna í § 3 soleiðis, at tað bert eru teir persónar, sum blíva 67 ár, tá lógin kemur í gildi ella seinni, sum verða raktir av broytingini. Tað vil siga persónar, sum blíva 67 ár dagin eftir at lógin er kunngjørd ella seinni. Hetta merkir so, at persónar, sum blíva 67 ár, áðrenn lógin kemur í gildi, kunnu fáa frádráttin, um teir ikki fáa fólkapensjón. Talan kann vera um persónar, sum ikki biðja um fólkapensjón og persónar, sum útskjóta fólkapensjón. Hesir fáa so frádráttin inntil teir einaferð fáa fólkapensjón.

TAKS skal annars vísa á, at tað eru nakrir fáir persónar 67 ár ella eldri, sum í dag fáa pensjónsfrádráttin.

Eisini kunnu vit viðmerkja, at barnafrádrátturin í kommunuskattinum er ásettur í § 46 í skattalógini og TAKS metir, at tað hevði verið meira gjøgnumskygt, um allir frádráttir í kommunuskattinum vóru ásettir sama stað.

Vinarliga

Rúna F. Guttesen
ráðgevi
tel. 352743

TAKS
Postrúm 2151, 110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.

Notice
Please notify me and delete this e-mail and its contents if you are not the intended recipient of this e-mail.